

# Almannastovan søkir fulltrúa

## Talan er um eitt fulltíðarstarv á Stjórnardeildini

Á Almannastovuni virka vit miðvíst fyri at lúka krøvini frá politiska myndugleikanum og viðskiftafólkunum. Dentur verður lagdur á høgt tænastustøði, rættartrygdina og virðingina fyri einstaklinginum, eins og virkað verður fyri áhaldandi at menna førleikan, trivnaðin og samstarvið á stovninum.

Á Stjórnardeildini eru 3 starvsfólk í fulltíðarstarvi og ein deildarleiðari. Starvsøkið hjá Stjórnarskrivstovuni fevnir um ráðgeving og vegleiðing til leiðslu og starvsfólk í sosialfakligum, løgfrøðiligum og øðrum fyrisitingarligum spurningum, gerð av innanhýsis leiðbeinandi reglum og kunningartilfari, kæruummæli, ummæli av lógar- og kunngerðaruppskotum o.a..

Fulltrúin verður partur av einum stovni, ið alla tíðina má tillaga seg broytingarnar í samfelagnum og taka við avbjóðingunum, sum liggja í tíðini og í framtíðini.

Vit sóknast eftir einum fólki, ið hevur samfelagsfrøðiliga, løgfrøðiliga ella aðra hóskandi universitetsútbúgving. Tað er ein fyrimunur at hava starvsroyndir innan fyrisiting á almannaøkinum.

Okkara ynski er, at viðkomandi er virkin og nærlagdur, hevur góð samstarvsevni og arbeiðir sjálvstøðugt við at loysa uppgávurnar í tráð við endamálið hjá stovninum og teir málsetningar, stovnurin hevur.

Arbeiðsuppgávunar hjá fulltrúanum fevna um ráðgeving og vegleiðing til leiðslu og starvsfólk, ummælan av uppskotum til lógir og kunngerðir, málsviðgerð í ávísum málum, tilevnan av leiðbeiningum og kunningartilfari, luttøku í tvørfakligum samstarvi og aðrar uppgávur á deildini.

Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Mariu Jacobsen, deildarleiðara á telefon 35 35 10.

Skrivlig umsókn skal verða Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 14. februar 2006.

Send umsóknina til
Almannastovuna,
Smyrilsvegur 20,
Postboks 3096,
110 Tórshavn.

almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo

KREA.FO · TEL 47 80 80

**FISKIMÁLARÁÐIÐ**
Ministry of Fisheries and Maritime Affairs




# LIVRADAGAR Í ÚTVARPSHØLLINI

**Endamálið við fundinum er at kunna um, hvussu skipanin við livradøgum fer at virka, og hvussu tillutingin av eyka fiskidøgum fer fram eftir kunngerð nr. 1 frá 3. jan. 2006. Kunnað verður um framleiðslu úr livur og møguleikum fyri at nýta meira av teimum pørtunum av fiskinum, sum vanliga ikki verða nýttir til matna ella verða tveittir burtur. Spurningurin um gagnnýtslu av innvølum verður viðgjørdur út frá einum breiðum sjónarmiði um burðardygga veiðu, fiskiskapi við ábyrgd og etiskum hugleiðingum, og greitt verður frá, hvussu altjóða rákið kann ávirka okkum.**

**Mikudagin 1. februar 2006, kl. 13.00-17.00 í Útvarpshøllini.**
Tiltakið er ókeypis, men ynskiligt er at boðað verður frá luttøku frammanundan á telefon 353030 ella við telduposti annak@fisk.fo.

**Kl. 13.00 Bjørn Kalsø,** landsstýrismaður, bjóðar vælkomin

**13.10-13.20 Egil Olsen, stjóri.**
Greiðir frá royndunum hjá Faroe Marine Biotech á Eiði.

**13.20-13.40 Helgi Nolsøe,** leiðari fyri Granskingarkjarnuni fyri framleiðslutøkni.
Royndir við ymiskum hættum at taka livur í Føroyum.

**13.40-14.00 Hóraldur Joensen,** leiðari fyri Granskingarkjarnuni fyri lívtøkni.
Um aðra „hjávøru" enn livur.

**14.00-15.00 Hvat gera vit, og hvat síggja vit fyri okkum í hesum.**
Stutt innlegg frá 5-6 fólkum úr vinnuni.

**15.00-15.30 Kaffi**

**15.30-16.00 Rógvi Reinert,** aðalstjóri í Fiskimálaráðnum.
Gjøgnumgongur kunngerðina um livradagar.

**16.00-16.20 Guðrið Andórsdóttir,** góðskuleiðari á Faroe Seafood.
Rákið uttanífrá og økta trýstið frá umheiminum.

**16.20-17.00 Orðaskifti/kjak. Herálvur Joensen,** sendimaður.

www.fisk.fo